# Húsmóðir

Hon sat í stólinum í stovuni og bant hosur. Ígjøgnum vindeygað sá hon stóra, gráa bygningin. Hon hoyrdi tungar lastbilar koyra framvið. Ljóðið av stórum skipum, sum lógu við kai, buldraði um alla bygdina, og lukturin av fiski setti seg í klæðini, ið hingu á snórinum uttanfyri. Útsýnið ígjøgnum vindeygað var nógv broytt, síðani hon var smágenta. Hon smíltist og mintist aftur á grannalagið, ið einaferð var. Eftir vegnum vóru lítil hús, ið høvdu rúmað stórum barnafamiljum. Nú var lítið av grannalagnum eftir.

Hon reistist, kroppurin var ikki tann sami, sum hann plagdi at vera. Hon gekk framboygd yvir til køkin og fekk sær te í krússið. Ommudóttirin hevði verið á gátt. Hon hevði errin fortalt, at eftir summarfrítíðina ætlaði hon sær til Danmarkar at lesa víðari. Ommudóttirin hevði altíð klárað seg væl, hevði flogið ígjøgnum ungdómslívið við góðum úrslitum.  Hon var glað hennara vegna. Sjálv hevði hon onga útbúgving, bert eitt prógv frá fólkaskúlanum. Eftir fólkaskúlan hevði hon fingið arbeiði sum heimahjálp, og tað hevði dámt henni væl. Jóhan hevði hon møtt til eitt møti í bygdini, og stutt eftir giftust tey.
Hon setti seg við borðið og drakk úr krússinum, meðan hon lurtaði eftir útvarpinum. Í sambandi við 8. mars hevði útvarpsstovan vitjan av kvinnum, sum á ein ella annan hátt vóru sermerktar. Verturin spurdi nú, hvussu hesar megnar kvinnur høvdu klárað seg so væl. Jú, orsøkin var tann, at tær høvdu arbeitt hart, raðfest útbúgving fyrst og ikki latið nakran avgera framtíð teirra, høvdu tær svarað. Kvinnubrot blivu tær kallaðar.

Børnini vóru komin stutt eftir, at Jóhan og hon giftust. Níggju børn bleiv barnaflokkurin til. Eins og hinar kvinnurnar í grannalagnum gjørdist hon heimagangandi húsmóðir. Jóhan hevði egið virki, og við hennara stuðuli heimanífrá fekk Jóhan lagt orku og tíð í arbeiði sítt.
Um morgnarnar fór hon altíð upp áðrenn hini í húsinum. Hon bakaði rugbreyð og bollar og setti viðskera á borðið, so klárt var hjá børnunum at eta morgunmat. Eftir at Jóhan og børnini vóru farin heimanífrá, setti hon seg í stólin í stovuni at bøta klæðir, sum børnini høvdu fingið hol á. Hon legði nógva orku og tíð í arbeiðið. Alt, ið hon setti sær fyri, fullfíggjaði hon.
Tá ið klokkan nærkaðist tólv, fór hon inn aftur í køkin at rokast. Nógvur matur skuldi gerast, tí um døgurðatíð komu børnini, Jóhan og arbeiðsfelagar hansara at eta døgurða. Hóast tað var strævið at gera mat til 20 fólk, elskaði hon tað, tá ið øll vóru savnað við borðið. Hon kendi seg

heila. Tá ið øll vóru farin, og húsið aftur var tómt, fór hon í holt við at rudda og vaska. Ongin uppvaskimaskina var, so eins og klæðini blivu tallerkar, bestikk og grýtur vaskað við hond. Hendurnar bóru brá av arbeiði hennara, men tað legði hon ikki í. Gerandisuppgávurnar skuldu gerast, hóast hendurnar bønaðu um ein steðg.
Tá ið børnini komu heim úr skúla, var alt húsið reint, og á borðinum stóð millummáli klárur. Hóast børnini ikki hugsaðu stórvegis um tað vælsignilsið, visti hon, at ikki øll børn í bygdini vóru eins heppin og hennara. Tíðirnar vóru harðar. Eftir at børnini høvdu etið, fór hon at hjálpa teimum við skúlatingum. Við níggju børnum í skúlaaldri vóru skúlatingini mong, men tað sá hon ikki sum eina forðing. Góða skúlagongd til børnini hevði hon altíð raðfest høgt.
Um kvøldið, tá ið Jóhan kom heim frá arbeiði, vóru skúlatingini hjá børnunum gjørd. Hon setti aftur mat á borðið, og øll familjan savnaðist at eta, meðan tey lurtaðu í tøgn eftir útvarpinum. Tá ið øll vóru liðug, og hon hevði vaskað upp, fór hon í gongd við at gera børnini klár at fara í song. Hon hjálpti teimum minstu við at busta tenn og koma  í náttklæðir. Hon legði tey minstu at sova fyrst og arbeiddi seg síðani uppeftir til tey elstu. Hon gav sær altíð stundir at tosa og biðja eina bøn við hvørjum barni. Tá ið hon kom inn aftur í stovuna, var Jóhan sovnaður á sofuni eftir ein langan og harðan arbeiðsdag. Hon fór yvir til hansara, legði eitt teppi oman yvir hann og setti seg síðani í stólin við vindeygað at binda. Tá hon sat har og bant, fekk hugaheimur hennara loyvi til at ferðast. Tíðin við stokkunum var hennara andipláss, og hon neyt løtuna. Útsýnið ígjøgnum vindeygað var serstakt. Sólsetur var, og vakurt litspæl sást á himmalinum. Hon hoyrdi menniskju práta, meðan tey gingu túr fram við sjóvarmálanum.

Prátið í útvarpstovuni var endað, og tónleikur ljómaði úr útvarpinum. Tankar hennara mólu. Hon hevði raðfest øðrvísi enn tær kvinnur, ið høvdu prátað í útvarpinum. Hon hevði onga útbúgving, og hon hevði latið kærleikan til Jóhan og børnini avgera hennara kós í lívinum. Hon og kvinnurnar høvdu kortini eitt í felag, og tað var, at tær allar høvdu kempað hart fyri at fullfíggja dreymar sínar, hóast teir sóu ymiskir út. Tað, Jóhan og hon høvdu sínámillum, kundi ikki lýsast við orðum. Hon hevði elskað hann av heilum huga, eins og hann hevði elskað hana. Og at síggja dreymar hansara blíva til veruleika, hevði hon ikki viljað verið fyri uttan. Børnini vuksu upp undir góðum korum, og tey kláraðu seg øll væl í lívinum, hvør á sín hátt. Hetta hevði verið dreymur hennara.

Hon setti seg í stólin í stovuni. Sum hon sat og bant, kom ein kensla av nøgdsemi yvir hana. Hon var nøgd við tað, hon hevði framborið í lívinum. Hon hugdi aftur við takksemi á teir møguleikar, hon hevði fingið og givið víðari til børn og ommubørn. Samstundis gleddist hon við teimum kvinnum, sum í dag høvdu allar møguleikar framman fyri sær. Hon ásannaði, at í samfelagsins eygum var hon einki kvinnubrot, hon var bert ein húsmóðir, men tað var hon nøgd við.